

## Donadoni veður landsliðsvenjari

Marcello Lippi boðaði stutt eftir sigurin hjá Italia í HM-finaluni frá, at hann gevst sum landsliðsvenjari hjá Italia. Lippi var nógv avhildin sum landsliðsvenjari, men hann valdi at gevast, nú hann hevði sent Italia upp á heimstindin. Italska fótbóltssambandið hevur gjørt skjótt av við at finna ein avloysara, og nýggjur landsliðsvenjari verður fyrrverandi stórspælarin Roberto Donadoni. 43 ára gamli Donadoni spældi fyri Milan, og seinastu árini hevur hann verið venjari hjá felagnum Livorno.

## – Eg komi aftur næsta ár

Danski álopsspælarin David Nielsen skifti fyrr í ár til Start at spæla, og hann kom á vøllin í dystinum ímóti Skála hóskvøldið. Hetta var annað árið á rað, at David Nielsen spældi UEFA Cup dyst í Føroyum, tí í fjør roydni hann seg við FC Midtjyllandi ímóti B36.

– Eg komi aftur næsta ár, segði David Nielsen, tá ið hann fór av vøllinum á Svangaskarði mikukvøldið.

David Nielsen og Todi Jónsson hava áður spælt saman í FCK, og hóskvøldið kom David Nielsen inn fyri Toda miðskeiðis í senna hálvleiki.

# GÍ kann spæla seg víðari

**Tað eydnaðist ikki Ventspils at taka GÍ á fótum í UEFA Cup dystinum í Letlandi í gjárkvøldið. GÍ fekk fínt úrslit heim við sær, og nú hevur liðið úr Gøtu veruligan møguleika at spæla seg víðari í kappingini**

UEFA CUP

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

GÍ spældi í gjárkvøldið fyrra dystin ímóti Ventspils í UEFA Cup kappingini. Dysturin varð spældur í Letlandi, og tað eydnaðist gøtumonnum at fáa eitt gott úrslit við sær heimaftur.

Ventspils tapti dystin 2-1, men GÍ hevur nú møguleikan at spæla seg víðari við einum lítlum sigri á heimavølli. Vinnur GÍ heimadystin 1-0, so kemur liðið víðari eftir regluni um útivallarmál.

Væl inn í seinna hálvleik var støðan í dystinum 1-1, men so sló tann langi Ndeki aftur til og skoraði sítt seinna mál í dystinum.

Hann hevði eisini lagt Ventspils á odda, tá ið 24 minuttir vóru spældir, og tað var mest sum vónleyst hjá GÍ-spælarunum at halda tí myrka álopsspælaranum, sum mundi verða úti við tveir metrar høgur.

### Flott mál

GÍ fótaði sær eftir málið hjá Ventspils, og longu fimm minuttir seinni javnaði Símun Louis Jacobsen. Hann dró sjálvur fram í høgru og eitt sindur inn á vøllin, áðrenn hann smekkaði til í netið. Málið var sera gott.

Í hálvleikinum var støðan 1-1, og hetta var eisini støðan til 66 minuttir vóru spældir. Tá skoraði Ndeki aftur.

Ventspils hevði meira spæl allan dystin, og teir løgdu fyri við einum øgiligum trýsti á GÍ. Fyri nøkrum árum síðani vann Ventspils heili 8-0 á B68, og teir høvdu kanska ætlanir um at taka enn eitt føroyskt lið á bóli. Tað eydnaðist ikki heilt, og GÍ fótaði sær eftir eina trupla byrjan.

Í seinna hálvleiki hevði Ventspils eisini meira spæl. Tað var krevjandi hjá føroysku spælarunum at stríðast í tí nógva hitanum, og í seint í dystinum spældi GÍ við 10 monnum, tí Magni Jarnskor fekk reytt kort fyri hevnisøku.

Men GÍ kom á mál við einum góðum úrsliti, sum skapar spenning um seinna dystin, ið verður spældur á Svangaskarði hósdagin 27. juli.

FAKTA

**Ventspils-GÍ 2-1 (1-1)**

**UEFA Cup, 1. innleiðandi umfar, fyrri dystur**
**1-0:** Ndeki, 24.
**1-1:** Símun Louis Jacobsen, 29.
**2-1:** Ndeki, 66.
**GÍ:** Geza Turi – Sam Jacobsen, Niclas Niclasen, Kaj Ennigarð, Magni Jarnskor – Símun Louis Jacobsen (Sverri Jacobsen), Pól Ennigarð, Sámal Joensen, Hanus Jacobsen (Erling Jacobsen) – Gunnar Nielsen – Pól Arni Jacobsen (Áslakur R. Petersen)

# Tað var lítil futtur



**Ferðin var lítil, teir dugdu ikki at fáa nyttu burturúr Toda, og fram móti dystarenda megnaði Skála at styrkja um sína støðu**

SKÁLA-START

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Talan verður ikki um stórvegis europeiskt ævintýr hjá Skála, sum fyri fyrstu ferð luttekur í UEFA Cup. Tepri sigurin á útivølli ger tað sera sannlíkt, at Start um tvær vikur fer at tryggja sær samantalda sigurin.

Men tað var torført at sannføra tey 720 eygnavitnini um, at mótstøðuliðið hjá skálamonnum í fjør var um reppið at vinna norska meistaraskapin.

Start spælið var avgjørt einki at reypa av. Fyrstu løtuna, tá ið tað var stórur fjáltur á Skála spælarunum, spruttaðu gestirnir eitt sindur. Tá var tað, at teir fingu sigursmálið. Alex Valencia sendi horna inn fyri úr høgru, og vinstri vongverjin og toppskjúttin Marius Johnssen smekkaði høvdið undir bóltin.

Sum 1. hálvleikur leið og serliga fram móti endanum av 2. hálvleiki, var norska avrikið einki at reypa av. Tom Nordlie, sum avgjørdur gav til kennar, at hann var ikki nøgdur, og hansara menn vórðu undan kappingarbyrjan roknaðir millum favorittarnar at vinna NM. Nú eru teir niðarlaga á stigatalvuni, og tað er einki at undrast á, at hetta liðið er í tunga endanum. Heldur er tað at undrast á, at umleið teir somu spælararnir inntil síðsta bríksl í landskappingini í fjør vóru við í NM stríðnum.

Gamaní vóru teir skjótari og kropssterkari enn Skála spælararnir. Men teir kendust dovisligir, teir fluttu seg lítið, hugflogið var lítið og einki, teir megnaðu so at siga ikki at bróta ígjøgnum í borðunum, og tá ið tað endiliga eydnaðist, so vóru innleggini illa tímaði og óneyv.

### Brúktu ikki styrkirnar hjá Toda

Øll eygu fylgdu Toda Jónsson. Í 4-3-3 álopsskipan, sum varð broytt til 4-5-1, tá ið Skála hevði bóltin, var hann miðframherji. Høvuðsdygdirnar hjá Toda hava altíð verið eksplosiviteturin, gjøgnumbrotsstyrkin og skotroyndir við høgari ferð.

Tað sást einki til nakað av hesum. Spælkonseptið hjá Start er ikki soleiðis,